# Ein heiður at



- *Útbúgvingina sum politikari fært tú bara við royndunum og aldrinum, staðfestir 69 ára gamli tjóðveldismaðurin, Heini O. Heinesen, sum nú fyri aðri ferð skal seta tingið sum aldursforseti á Føroya Løgtingi*

**Hann hevur altíð havt størstu virðing fyri Føroya Løgtingi. Tí tekur tjóðveldismaðurin og politiski veteranurin, Heini O. Heinesen tað eisini sum ein heiður at sleppa at seta tingið fyri aðru ferð sum aldursforseti**

VANGAMYND
*Anna V. Ellingsgaard*
*anna@sosialurin.fo*
*Mynd: Jens K. Vang*

Sum ungur sat hann við andakt og lurtaði, tá útvarpið sendi politiskt orðraskifti á tingi. Í oyrunum á unga Heina O. Heinesen vóru menn sum Erlendur Patursson og Christian Djurhuus onki minni enn politiskar kempur.

- Tað var ikki tí eg var samdur við tí, sum Christian Djurhuus í Sambandsflokkinum førdi fram. Men hann og Erlendur dugdu at orða seg á ein so greiðan og skilagóðan hátt, sum bergtók meg fullkomiliga. Eg havi ongantíð verið hugtikin av politiskum buldri og braki. Men hetta, at kunna orða seg greitt og samstundis halda fast um politisku hugsjónina er ein gáva, tey flestu bara kunnu droyma um, sigur Heini O. Heinesen, sum longu tá var sannførdur tjóðveldismaður.

### Kanst ikki læra til politikara

Sjálvur tordi Heini O. Heinesen heldur ikki av álvara at droyma um at fáa ein sess millum mætu fyrimyndirnar á tingi, fyrr enn hann var rættiliga tilkomin. Tískil gjørdist hann 46 ár, áðrenn hann stillaði upp til løgtingsval í 1984 og varð valdur á ting á fyrsta sinni.

- Samanbera vit við í dag, so ljóðar tað kanska sum ein høgur aldur. Sjálvur